STARVSLÝSING:

# BYGGIFRØÐINGUR TIL H-DYGD/ALUPLAST SAMTAKIÐ

Vit leita eftir einum ágrýtnum byggifrøðingi, at styrkja um fakligu leiðsluna av vindeyga- og hurðaframleiðsluni, og aðrar byggifrøðingauppgávum hjá felagnum.

H-DYGD/Aluplast framleiða vindeygu, hurðar og fasadur v.m. úr PVC, træ, træ/alu og aluminium. Umframt hetta hava vit montørtoymir at seta bæði vindeygu, hurðar og fasadur upp.

H-DYGD/Aluplast er einasti føroyski heildarveitarin av aluminiumfasadum, hurðum og vindeygum úr PVC, træ og aluminium.

Hjá samtakinum starvast í løtuni 52 starvsfólk.

**Vit bjóða:**
Eitt sera fjøltátta og mennandi arbeiði, har tú kemur at mynda framtíðarmál fyri samanløgdu feløgini H-DYGD/Aluplast.
Tú vísir til rakstrarleiðaran hjá Samtakinum.
Arbeiðsstaðurin er í høvuðsheitum í virkisbygninginum hjá H-DYGD í Miðvági.
Løn sambært avtalu.

**Arbeiðsuppgávur:**
- Planlegging og optimering av PVC-framleiðsluni í Miðvági
- Høvuðsábyrgd av góðskutrygging av øllum veitingum hjá Samtakinum
- Ymiskar logistikk uppgávur
- Umsiting av framleiðslu/søluforritið hjá felagnum

**Vit vænta, tú:**
- Ert útbúgvin byggifrøðingur ella við líknandi royndum
- Hevur áhuga í framleiðslu og optimering
- Ert jalig/ur, vælskipað/ur og arbeiðir væl undir trýsti
- Hevur hollan teldukunnleika, og evnir at seta teg inn í nýggj forrit
- Kanst samskifta á enskum og skandinaviskum
- Ert fleksibul og álítandi

Umsóknarfreistin er 22/3-2019. Umsóknin kann sendast til kr@hdygd.fo

Um tú hevur spurningar til starvið, kanst tú venda tær til Fróða Hansen á tlf 29 00 01, ella á frodi@hdygd.fo

Í GEILINI 2 / FO-385 VATNSOYRAR / 355 000
POST@ HDYGD.FO / WWW.HDYGD.FO

H-DYGD